**Býráðsfundur hósdagin 1. juli 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 00.45**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **13/00236**<br>**Viðtøkur til foreldraráðini á dagstovnaøkinum**<br>Víst verður til frágreiðing og tilmælið dagfest 10.juni. 2013.<br><br>Trivnaðarnevndin mælir til at ganga tilmælinum frá umsitingini á møti. Trivnaðarnevndin mælir til at sletta "Ráðgevingin er ikki bindandi fyri leiðaran." | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini. |
| 2. | **13/00291**<br>**Velta fram við Landsvegnum**<br>Janus Joensen hevur sent fyrispurning um lovyi at velta fram við landsvegnum, matr. nr. 196a í Norðragøtu.<br><br>Byggi- og byýarskipanarnevndin mælir frá at geva bóndanum loyvi at velta fram við landsvegnum og Eiðisá. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini |
| 3. | **13/00284**<br>**Eykajáttan - Børn við serligum tørvi**<br>Víst verður til frágreiðing og tilmælið dagfest 10.juni. 2013.<br><br>Trivnaðarnevndin gongur tilmælinum frá umsitingini á møti. Mælt verður til at upphæddin verður tikin av barnavernd.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini, og veita eykajáttan á kr. 300.000,00. Peningurin verður tikin av konto 2.21.31.510 (Barnavernd) | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini. |

**Býráðsfundur hósdagin 1. juli 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 00.45**

**4. 13/00302**

**Eykajáttan til konto 2.21.72.510 (Forsorg)**

Á fíggjarætlanini er avsett 350 t.kr. til konto 2.21.72.510 (Forsorg). Talan er um útreiðslur kommunan hevur av fríplássum í dagstovnunum.

Nýtslan higartil í á er á kr. 332 t.kr. og framrokningin vísur at samlaða nýtslan í ár verður 750 t.kr. og sostatt er neyðugt við ein eykajáttan á kr. 300 t.kr.

Fíggjarnevndin mælir til at veit eykajáttan á 350 t.kr.

Peningurin verður tikin av innistandandi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**5. 13/00282**

**Arbeiði til fólk í Eysturkommunu við skerdum førleika**

Víst verður til frágreiðing og tilmælið dagfest 10.juni. 2013.

Trivnaðarnevndin mælir til at ganga tilmælinum frá umsitingini á møti við niðanfyristandandi broyting.

Trivnaðarnevndin mælir til at fólk við skerdum førleika skulu hava møguleika fyri at arbeiða okkurt fyrifallandi tímalønt arbeiðið hjá kommununi. Hetta skal verða tillagað starv ígjøgnum Almannaverkið. Frávik kunnu tó gerast, um hesi fella uttanfyri almannaverkið.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.

**6. 13/00136**

**Fríðkannarætlan 2013**

Á fundinum hjá Trivnaðarnevndini fríggjadagin tann 14. juni 2013 og var hetta málið umrøtt har tekniski leiðarin kunnar um at játtanin uppá fríðkan (viðlíkahald) er 300.000,00 kr. Av hesum skal ung í arbeiði lønast. Somuleiðis er ruddingardagurin fíggjaður av somu konto.

Trivnaðarnevndin mælir til at ein gartnari verður settur í fast starv í kommununi.

Fyrst bleiv atkvøtt um tilmæli hjá fíggjarnevndini og atkvøtt beliv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Brandur Jacobsen

**Atkvøður ímóti:**
Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen,

**Býráðsfundur hósdagin 1. juli 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 00.45**

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fáa eykajáttan á kr. 400.000,00 fyri at fáa røkt av grønum øki, fríøkir, sláa gras og garntnara.

Fíggjarnevndin mælir til, at spurningurin um at seta gartnara í fast starv verður tikið upp til viðgerðar aftur í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2014.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini og veita eykajáttan á 200.000,00 kr

Peningurin verður tikin av innistandandi.

Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Oluffa Jacobsen

Síðani bleiv atkvøtt um tilmæli hjá byggi- og býarskipanarnevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri**
Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Oluffa Jacobsen, Árni Jacobsen, Jóhan Christiansen

**Atkvøður ímóti:**
Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen

Sostatt er tilmæli hjá byggi- og býarskipanarnevndin samtykt.

**7. 12/00306**
**Útstykking í Syðrugøtu - keyp av jørð**
Teknistovan hevur gjørt uppskot til eina útstykking í Syðrugøtu, sum ætlanin er skal brúkast til samráðingar við ognarhagan og keyp av lendi.

Á fundi við Teknistovuna tann 14. juni 2013 var uppskotið til útstykking gjøgnumgingið og verður her lagt fram til avgerð um, at arbeiða víðari við málinum og at byrja samráðingar við ognarhagan at keypa lendi.

Byggi- og býraskipanarnevndin mælir til at kommunan byrjar at samráðast við ognarhagan um keyp av lendi, sambært skitsuuppskotinum frá Teknistovuni Gøta.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**8. 13/00031**
**Nýggja kommunustýrisskipan.**
Støðutakan til fyriliggjandi uppskot til nýggja kommunustýrisskipan

Einmælt samtykt við ávísum broytingum

**9. 13/00226**
**Barnaverndarsamstarv**

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá

**Býráðsfundur hósdagin 1. juli 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 00.45**

Tilmæl frá trivnaðarnevndini fyriliggur.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

trivnaðarnevndini.

Endaligur samstarvssáttmáli skal leggjast fyri býráðið til góðkenningar.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Oluffa Joensen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Hanus Jacobsen, Árni Jacobsen

**Atkvøddi ímóti:**
Brandur Jacobsen

**10. 10/00313**
**Bussleið í Eysturkommunu**

Sáttmálin við AP-bussar gongur út tann 1. juli 2013.

Uppskot til nýggjarn sáttmála og tilmæli frá kommunustjóranum fyriliggur.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum til nýggjan sáttmála.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum fíggjarnevndini.

Eisini er samtykt at Vinnunevndin fer undir at eftrimeta bussleiðina, og kemur við uppskoti til tillagingar til fyrst komandi freist.

**11. 13/00281**
**Umsókn um ferðaískoyti**

Tilmæli frá mentanarnevndini og fíggjarnevndini fyriliggur.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

Fyrst bleiv atkvøtt um tilmæli hjá meirlutanum í fíggjarnevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Brandur Jacobsen, Oluffa Joensen

**Atkvøður ímóti:**
Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen

Síðani bleiv atkvøtt um tilmæli hjá mentanarnevndini og minnilutanum í fíggjarnevndini, og atkvøtt beliv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna

**Býráðsfundur hósdagin 1. juli 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 00.45**

Jensen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Brandur Jacobsen, Oluffa Joensen

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________

Hanna Jensen ______________________

Hanus Jacobsen ______________________

Emma Rasmussen ______________________

Hjalti Dalheim ______________________

Ólavur Olsen ______________________

Árni Jacobsen ______________________

Oluffa Joensen ______________________

Brandur Jacobsen ______________________